## Við snellu eftir makreli

Gongst sum ætlað kunnu íslendingar fáa ein nýggjan fiskiskap í teirra annars so umfatandi og fjølbroyttu fiskivinnu. Teir næstu mánaðirnar fara nakrir útróðrarmenn á Suðurlandinum at vita, um tað kann loysa seg fíggjarliga at fiska makrel við snellu. Royndir eru gjørdar tey bæði seinastu árini, og tær hepnaðust so mikið væl, at seinasta summar veiddu nakrir bátar 7.600 tons av makreli. Ein av útróðrarmonnunum sigur sambært Vísi, at alt bendir á, at hesin veiðiháttur kann loysa seg fíggjarliga, men at arbeitt verður við at menna útgerðina. Makrelurin verður heilfrystur ella royktur.



## ES kann læra av Íslandi

Tá tað snýr seg um at umsita fiskastovnarnar, kann Evropasamveldið læra av íslendingum og nýsælendingum. Tað heldur í hvussu er bretska tíðarritið The Economist, sum í síni seinastu útgávu umrøður ta sokallaðu Grønubók hjá ES um felags fiskivinnupolitikkin hjá samveldinum. The Economist skrivar, at tað er neyðugt við djúptøknum tiltøkum, um tað skal bera til at bjarga fiskivinnuni í ES og harvið tilverugrundarlagnum hjá fiskimonnunum. Í greinini verður nevnt, at danir, niðurlendingar og spaniumenn halda, at fiskivinnupolitikkurin skal tillagast marknaðinum, men at hesum eru fransmenn og írar ímóti.

# Bátafestivalar sum osa av hugna



*- Fyrsta árið vóru einir 30-40 bátar við, og síðan er talið bara vaksið, til tað í fjør vóru einir 70-80 bátar og manningar, sum tóku lut, sigur Høgni W. Høgnesen, sum vónar, at talið av bátum í ár fer at tátta í 100*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**- Nógv og stór tøk skulu takast fyri, at eitt slíkt tiltak skal gerast veruleiki. Vit eru sera fegin um allan tann stuðul, sum tiltakið hevur fingið, bæði frá kommunu og fólki í økinum. Uttan hesa hjálp og stuðul hevði hetta slett ikki borið til. Nú vóna vit øll, at vit fáa ein góðan og væleydnaðan bátafestival leygardagin, sigur Høgni W. Høgnesen, formaður í Bátafelagnum í Nes kommunu**

TOFTIR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Hetta er fimta árið á rað, at Bátafelagið í Nes kommunu bjóðar til bátafestival.

Tiltakið gjørdist veruleiki, eftir at fólk hin 13. mars fyri fimm árum síðan tóku stig til at stovna eitt bátafelag í kommununi.

Stovningarfundurin varð hildin í eldrasambýlinum Vesturskini á Toftum og flestu teirra, sum vórðu vald í fyrstu nevndina, hava sitið í nevndini síðan.

Felagið er mannað við fimm nevndarlimum, umframt tveimum tiltakslimum, men bæði limir og tiltakslimir virka sum ein eind og møta á fundi.

Formaður øll árini hevur verið og er framvegis Høgni W. Høgnesen og næstformaðurin, Rúni Hansen, hevur eisini verið hin sami øll árini. Høgni Hansen kom í fyrstu nevndina sum kassameistari, og hann røkir framvegis hesa uppgávu.

Øll eru heima, nú ársins fyrsti bátafestivalur verður á Toftum leygardagin uttan næstformaðurin, sum er til skips.

Av teimum, sum vóru við í fyrstu nevndini, men sum ikki eru við meira, eru Tórunn F. Gaardbo og Regin Debes. Í teirra stað eru komin Borgar Hansen og Haldur Gaardbo.

### Veksandi undirtøka

Upprunaliga skuldi bátafestivalurin á Toftum vera hildin seinasta leygardag, men av tí, at veðurvánirnar ikki vóru nakað serligar, gjørdi nevndin í góðari tíð av at útseta festivalin í eina viku, soleiðis at hann í staðin verður leygardagin komandi.

- Veðurútlitini eru hampilig. Hann sigur minkandi vind og turt. Nú má antin bera ella bresta, tí bátafestivalurin í Vestmanna verður longu leygardagin eftir, sigur Høgni W. Høgnesen, sum annars vónar, at veðurgudarnir fara at skikka sær hampiliga væl leygardagin.

Hann vísir á, at undirtøkan fyri bátafestivalinum á Toftum hevur verið veksandi øll árini síðan byrjan.

- Fyrsta árið vóru einir 30-40 bátar við, og síðan er talið bara vaksið, til tað í fjør vóru einir 70-80 bátar og manningar, sum tóku lut.

Høgni W. Høgnesen sigur seg vóna, at talið av bátum í ár fer at tátta í 100.

- Bátarnir møta í Skálafirði leygardagin klokkan 12.30, og klokkan 13.30 verður kósin sett úteftir Skálafjørðinum og út á Toftir.

Hann vísir á, at skipanin á Toftum verður hon, at eingin bátur fer inn í bátahylin í Oyrunum fyrr enn klokkan 15, tá móttøka verður við harmonikutónleiki, suppu og onkrum øðrum leskandi í matstovuni hjá Faroe Seafood.

Harmonikuleikarar byrja at spæla í Oyrunum, nakað áðrenn bátarnir stevna inn í hylin.

Høgni vísir á, at summir bátar sigla skjótari enn aðrir, og teinurin úr Skálafirði og út á Toftir er ikki so